# Fyribilsstarv sum varaskúlastjóri

Í samband við at varaskúlastjórin fer í farloyvi, verður starvið sum varaskúlastjóri í Fuglafjarðar skúla leyst til setanar í tíðarskeiðnum 1. august 2009 til 31. juli 2010.

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd og í samstarvi við skúlastjóran skal taka lut í teirri fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluni í skúlanum.
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans.

**Harumframt skal varaskúlastjórin**
- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans
- saman við skúlastjóranum átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava læraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann, sum sett/-ur verður, er tænastumaður frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

Umsóknir við ljósritið av prógvum og CV og møguligum viðmælum verða sendar skúlanum.

Freistin at søkja er 9. mars 2009 kl. 12

Nærri upplýsingar fáast frá Richard Johansen á telefon 737761 ella við at senda teldupost til richard.johansen@skulin.fo

Í Fuglafjarðar skúla verða komandi ár umleið 285 næmingar, og her koma at starvast eini 34 fólk.

Sí annars heimasíðu skúlans www.ffs.fo

## Fuglafjarðar skúli

**Postboks 9 · FO-530 Fuglafjørður**

## Skopunar Kommuna



# NÁMSFRØÐINGUR TIL BARNAGARÐIN Í GERÐINUM

Søkt verður eftir námsfrøðingum til »Barnagarðin í Gerðinum« at byrja 01.04.2009 ella eftir nærri avtalu.

Eitt starv upp á 35 tímar er í Listsmiðjuni, har børnini eru 3-7 ára gomul.

Eitt starv upp á 30 tímar er í Pinkustovuni, har børnini eru 6 mán. -3 ár.

**Um okkum:**
Barnagarðurin er 2 ára gamal. Har eru 2 barnagarðsstovur, 1 pinkustova og ein frítíðarstova, sum heldur til í øðrum hølum í bygdini.

**Vit bjóða tær:**
Eitt fjølbroytt starv, har tú eisini hevur møguleika at vera við til at menna og menta stovnin.

**Vit vænta:**
At tú hevur umsorgan, tolsemi og virðing fyri børnunum. Hevur áhuga fyri barnavirksemi bæði innandura og uttandura. Hevur góð samstarvsevnir og er fyrikomandi.

**Setanarviðurskifti:**
Løn og setanarviðurskifti eru skipað sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Um námsfrøðingar ikki søkja størvini, verða hjálparfólk fyribils sett.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Fríðu Eystberg Johannesen, stovnsleiðara tlf. 361202 ella fartlf. 216202, ella til Sigrid Petersen, varaleiðara tlf. 361689.

Skrivlig umsókn við prógvi og viðmælum, skal sendast til:

*Skopunar Kommuna, skúlavegur 5*
*Att: Fríða Eystberg Johannesen, stovnsleiðari*
*FO-240 Skopun*

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 06.03.09 á middegi

Setanarsamrøður verða í viku 11.

## Reyði Krossur Føroya

# Aðalfundur

Reyða Krossur Føroya hevur aðalfund sunnudagin 22.03.09, kl. 15:00
Í Húsinum hjá Reyða Krossi, Bryggjubakki 10, Tórshavn

Uppskot at viðgera á aðalfundinum skulu sendast til formannin í seinasta lagi 2 vikur undan aðalfundin.

Allir limir hava rætt at møta.

Limagjaldið fyri húski er kr. 150,- og feløg/stovnar kr. 400,- fyri ár 2009

Kann gjaldast í peningastovnum

**Reyða Kross Føroya**
**box 1015**
**FO 110 Tórshavn**

# KOYRIKORT?
## EYSTUROYINGAR

**Nýtt teoriskeið byrjar hósdagin 19. februar 2009 kl. 18:00.**

**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Jari Lykke | 590500 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |
| Hugo Kristiansen | 225225 |
| Andrea Isaksen | 211687 |




**EYSTUROYAR TEORISKÚLI**

# Jørð í Tórshavn til sølu

Jørð við ástandandi sethúsum til sølu, um hóskandi boð fæst.

Talan er um 8.394 m² í byggiøki A1.

**Áhugað kunnu ringja til 316451 ella 516451**

# Frá Vága Handverkarafelag

Ársaðalfundurin verður í húsinum hósdagin 5. mars 2009 kl. 19.00.

Skrá smb. lógum felagsins.

Um fundurin ikki er viðtøkuførur, verður eykaaðalfundur ½ tíma seinni.

**Nevndin**

# Skrivstovuhøli søkist

Sóknast verður eftir góðum hølum til skrivstovu í Havn. Stødd uml. 40-100 m². Hølini mugu hava góð parkeringsviðurskifti og liggja væl fyri.

**Ring ella skriva til 211996 / kho@post.olivant.fo**

Lesið Sosialin -so eru tit við!



**Hesin fitti Opel Kadett B**
**er til til sølu. Er fyrstu ferð skrásettur í august 1973 og er í sera góðum standi. Hevur einans koyrt 54.000 km. Hevur havt tveir eigarar, tann fyrra fyrstu 28 árini. Til sølu fyri 22.000 kr**
**Ringið 216409**